

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 08 - 2012

# Oljuføroyar fylla nógv í Oljunorra

Undir yvirskriftini Føroyar kunnu gerast eitt nýtt Kuwait hevur størsta oljublaðið í Norra, Stavanger Aftenblad samrøður við fleiri føroyingar um verandi oljuleiting og hvussu hon kann ávirka Føroyar og føroyingar, um olja ella gass verða funnin. Hetta verður prentað beint undan stóru altjóða oljumessuni ONS, so ein kann ikki siga annað enn, at Føroyar verða í miðdeplinum, nú túsundtals oljufólk úr øllum heiminum savnast í Stavanger í komandi viku. Stóri norski áhugin fyri Føroyum kemur eisini av, at tað er norska Statoil, sum í løtuni borar á føroyska landgrunninum. Journalisturin Rolv Christian Topdahl og myndamaðurin Kristian Jacobsen vitjaðu Føroyar herfyri og hittu nógvar ymsar føroyingar fyri at fáa eina breiða mynd av øllum oljumálinum. Teir vitjaðu eisini FOIB, sum stendur fyri Føroya Oljuídnaðarbólkur, umframt politikarar, vinnulívsfólk og fólk á gøtuni. Sí linkin niðanfyri til greinarøðina í norska blaðnum - http - //www.aftenbladet.no/energi/aenergy/Oil-can-turn-the-Faroe-Islands-into-the-new-Kuwait-3016019.html Mynd Stavanger Aftenblad vitjar í Havn. Mynd oljan.fo/Jan Müller